## Ikki lóg ímóti sólmiðstøðum

Hóast læknavísindin leingi hevur ávarað fólk ímóti at vitja tær sokallaðu sólmiðstøðirnar og ofta, tí sólirnar kunnu elva til krabbamein, tykist tað ikki, sum at ávaringarnar hava serliga stóra ávirkan. Hetta hevur víst seg í Danmark, og nú skrivar íslendska Morgunblaðið, at tað er tað sama har. Íslendski heilsumálaráðharrin, Ögmundur Jónsson, hevur kortini ongar ætlanir um at løggeva á økinum. Tað ætlar bretska stjórnin, sum arbeiðir við einum uppskoti um at banna fólki undir 18 ár at leggja seg á ein sólbonk.



## Húsaeigarar í gjaldstrupulleikum

Donsku realkreditfeløgini siga nú, at alt fleiri húsa- og íbúðareigarar hava trupult við at halda sínar lánsskyldur orsakað av fíggjarkreppuni, og at fleiri bústaðir tí fara at enda á tvingsilssølu. Ein avleiðing av gongdini er, at í øðrum ársfjórðingi noyddust realkreditfeløgini at yvirtaka 216 hús og íbúðir, sum fólk ikki megnaðu at gjalda. Tað er 32 fleiri enn í januar ársfjórðingi. Ein talskvinna hjá Realkredit Danmark sigur við DR-kringvarpið, at tað er serliga arbeiðsloysið, sum ger, at húsaeigarar fáa trupulleikar við at gjalda síni lán. Talskvinnan væntar ikki, at støðan fer at versna so nógv afturat.

# Pál er ársins Rock’n Rollari



**Ólavsøkukvøld kom so stóra løtan, tá ársins Rock’n rollari varð kosin. Tað var sjálvandi Mr. Rock’n Roll, sum stóð fyri virðislønini, sum Pál Joensen vann. Vit prenta her taluna, sum Kári Cool helt av pallinum við Miðlahúsið í Vágsbotni**

VIRÐISLØN

*Kári Cool*
*post@sosialurin.fo*

Tað eru tvey sløg av fólki í Føroyum. Tað er tann stóra fjøldin sum gongur dølsk runt og minnir mest um seyð - og tað ery tey fáu, sum liva lívið the rock'n'roll way.

Og so spyr onkur hvat tað merkir at liva the rock'n'roll way.

Well - tað ultimativa dømið var ein svenskur smádrongur, sum totalt rulaði á tennisvøllinum. Hann smashaði alla mótstøðu niður og vann alt sum hann var við í.

Eftir eina stóra kapping fór ein sjónvarpsmaður at vitja hann. Tá sjónvarpsmaðurin kemur, stendur hann og slær ein tennisbólt uppat eini garasjuhurð. Hann er so cool at hann steðgar ikki ein gang tá journalisturin og fotografurin nærkast, so teir mugu bróta hann av.



*Mannamúgvan í Vágsbotni var øgilig. Til samans var talan um væl meira enn 10.000 glaðar ólavsøkugestir*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

"Hvat ætlar tú tær at náa innan tennis", spyr journalisturin aftur.

Drongurin hyggur uppá hann, kaldliga og yvirlegði og svarar róliga: "Eg ætli at verða besti spælari í verðini".

"Heimsins besti spælari?" spyr journalisturin flennandi.

Men eyguni á dronginum eru so køld og rólig og bítandi, at láturin hjá journalistinum kvalist.

Og so leggur drongurin púra natúrliga og fullkomiliga róliga afturat: "Eg ætli at verða tann besti tennisspælarin nakrantíð!"

Journalisturin fer aftur at flenna - men aftur hyggur drongurin at honum við eygum so stingandi sum hjá eini cobra-slangu, og láturin kvalist aftur.

Og so endaði samrøðan. Journalisturin stóð sum